# Ítróttarblaðið



## Útsett hjá Gunnari

Dysturin millum Exeter og Tranmere Rovers var, eins og fleiri aðrir dystir í Onglandi um vikuskiftið, útsettur vegna frost og kava. Fríggjadagin fóru leikararnir hjá Tranmere Rovers longu leiðina til Exeter, har útlit vóru fyri, at tað varð spælandi leygardagin. Dysturin varð tó útsettir, tí partar av vøllinum vóru frystir. Gunnar skuldi ætlandi gera 'comeback' í Tranmere-troyggjuni týsdagin í farnu viku, men tann dysturin varð eisini útsettur vegna veður.


**Ítróttartoymið á Sosialinum:**


Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo


# Kristoffur er aftur í barndómsfelagnum



**FÓTBÓLTUR** Kristoffur Jakobsen og KÍ hava skrivað undir sáttmála, sum knýtir klaksvíkingin at hópinum hjá barndómsfelagnum næsta árið

Uni Holm Johannesen

Tað skrivar heimasíðan hjá KÍ.

Kristoffur Jakobsen spældi sín fyrsta dyst í bestu deildini í 2005. Hann hevur síðan spælt 114 dystir í fremstu røð, sambært Faroesoccer.com.

Kristoffur Jakobsen er 22 ár og spælir sum framrættaður miðvallari.

Nenad Stankovic, Hjalgrím Elttør og Kristoffur Jakobsen eru tískil knýttir at hópinum hjá KÍ í vetur.

– Vit eru nøgdir við gongdina, og tað verður helst ikki meira at hoyra frá okkum í eina tíð nú, sigur Jóhann Lutzen, stjóri í Sp/f KÍ.

*uni@sosialurin.fo*

# Fekk karantenu í 20 dystir

**HONDBÓLTUR** Spælarin hjá Kyndli, sum hóskvøldið gav mótstøðuleikara nevan í andlitið, hevur fingið revsing frá nevndini í Kyndli

Uni Holm Johannesen

Aftaná fyrstudeildardystin millum Kyndil og Neistan hóskvøldið, gav ein leikari hjá Kyndli einum neistamanni nevan í andlitið. Pápi neistaleikaran, sum sat millum áskoðararnar, leyp inn á vøllin og slóð kyndlaleikaran.

Bæði málini vórðu meldað til løgregluna.

Nú hevur nevndin í Kyndli revsa sín leikara.




Í viðtøkunum hjá Kyndli frá 21. mai í 1991 stendur í grein 2, at »Ósømiligur og ljótur atburður felagnum til niðurløgu verður ikki toldur. Stjórnin sektar brot á hesa grein við karantenu upp til tríggjar mánaðir ella við útliman.«

Nevndin hevur gjørt av, at viðkomandi spælari verður útihýstur at spæla við Kyndli í 20 dystir frá í dag at rokna. Umhýsingin umfatar landskappingar- og steypakappingardystir í 1. deild, U20 og U17 og varar í tilsamans tveir mánaðir.

Nevndin hevur lagt til grund fyri avgerðini, at spælarin ongantíð hevur víst slíkan atburð fyrr, og at spælarin er ungur og hevur framtíðina fyri sær í felagnum.

Kyndil harmast almikið hendingina, og ta óhepnu almennu umrøðu, hon hevur havt við sær fyri hondbóltsspælið.

Nevndirnar í Kyndli og Neistanum hava havt samband sínamillum um málið, og venjararnir hava tikið stig til at fáa viðurskiftini aftur á beint millum allar spælarar á báðum liðunum.

*uni@sosialurin.fo*

## Miðlarnir skriva...

*»Nevndin hevur gjørt av, at viðkomandi spælari verður útihýstur at spæla við Kyndli í 20 dystir frá í dag at rokna. Útihýsingin umfatar landskappingar- og steypakappingardystir í 1. deild, U20 og U17 og varar í tilsamans tveir mánaðir.«*

**www.kyndil.fo**

*»Nú skilja vit ikki føroyskt, men vit høvdu varhugan av, at spælarar á KÍF liðnum vóru ónøgdir við onkra døming. Hetta taka vit okkum ikki nær, tí slíkt hendir eisini í Svøríki.«*

**Martin Gomér og Johan Gomér á heimasíðuni hjá Neistanum**

*»Tað hevur ligið í kortunum leingi og fleiri hava ikki ivast í at Piotr skuldi halda á fram, men í dag kunnu vit so steðga øllum leysasøgum og kunngera at Piotr hevur skrivað undir nýggjan sáttmála.«*

**www.b71-sandoy.com**

*»Um annan hálvleik kann stutt sigast, at vit mistu alla konsentratión, har var einki skil á. Hetta gjørdi, at vestmenningar blivu reiðiliga tendraðir, og tað sást, at teir gjørdu sær dælt av hesum.«*

**www.h71.fo**

**»** - Sum er fær eingin av spælarunum hjá KÍF pengar fyri at spæla hondbólt. Teir spæla við hjartanum, sum eg haldi er tað týdningarmesta. Tað hevur so ført til, at KÍF – kanska – í ár kemur at spæla í FM-finaluni

JAN OTTESEN, KÍF

